## Pinligt avrik av Frem

Danska felagið Frem, har tríggir føroyingar spæla, tapti í gjár heili 5-2 á heimavølli ímóti HIK. Heimasíðan hjá Frem kallar avrikið hjá sínum monnum fyri pínligt. Eingin føroyskur spælari var á vøllinum í stórtapinum, men bæði Atli Gregersen og Gunnar Nielsen, sum er komin fyri seg aftur eftir skaða, sótu á beinkinum. Jónas Tór Næs, sum hevur verið fastur maður á liðnum, hevur ikki spælt seinastu umførini.

Frem liggu mitt á stigatalvuni í donsku 1. deild, nú tað mangla tríggir dystir. Vandin fyri niðurflyting er ikki stórur, hóast stigamunurin niður eftir ikki er tann heilt stóri.



## Dómararnir taka rennitest

Í morgin verður fyrsta royndin við nýggju testini hjá FIFA fyri altjóða dómarar gjørd á Svangaskarði. Dómarar og hjálpardómarar skulu standa royndina, um teir skulu døma altjóða dystir. Royndin á Svangaskarði er fyrst og fremst ætlað føroysku FIFA-dómarunum og hjálpardómarunum, men Fótbóltssambandið hevur boðað frá, at aðrir dómarar eisini eru vælkomnir at royna rennistestina týsdagin. Hendan testin verður neyðug, um dómarar skulu gera sær vónir um at sleppa at døma fyri FIFA.

# Fernando Alonso vann skandalukoyring í Monako

**Fernando Alonso fekk uppaftur størri glopp niður til mannin á næsta plássi í kappingini um heimsmeistarheitið í eini sera spennandi koyring, ið tó stendur í skugganum av kontroversiellu parkeringini hjá Michael Schumacher, ið hevði við sær at hansara byrjunarstøða var kolldømd**

FORMIL1

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fernando Alonso vann sannførandi á formil 1 breytini í Monako, heili sekstan sekund vóru millum hann og Juan Pablo Montoya á øðrum plássi, men tekniskir trupulleikar skuldu til, áðrenn sigurin gjørdist sannførandi, tí bæði Kimi Räikkönen og Mark Webber pressaðu hann hart inntil teirra bilar brendu saman.

Koyringin var merkt av tøttum nærdystum, har bilarnir vóru býttir upp í tríggjar bólkar, ið innanhýsis lógu sera tætt. Eisini vóru nógvar yvirhálingar í eini sera spennandi koyring.

Fyri Trulli tyktist vend endiliga at vera komin í kappingarárið, ið er byrjað sera illa fyri italiumannin, men við fimm umførum gav hansara Toyota bilur upp andan, meðan Trulli var á triðja plássi.

Stóra yvirraskilsi var David Coulthard, ið koyrdi sín Red Bull á triðja pláss. Eitt pláss, ið liðfelagin Christian Klien ivaleyst hevði fingið, var hansara bilur ikki steðgaður upp við fáum umførum eftir.

Michael Schumacher megnaði at koyra seg úr seinastu byrjunarstøðu upp á fimta pláss, og hetta var eitt plástur á sárið fyri eitt vikuskiftið har hansara umdømi veruliga fekk ein svartan blett.

Hetta vikuskiftið í Monako var annars merkt av ósportligum atburði. Fyrst var tað parkeringin hjá Michael Schumacher og forðingin hjá Fisichella í tíðarkoyringini, ið teir báðir vóru revsaðir fyri, síðan var tað byrjanin har Albers skumpaði liðfelagan Monteiro. Síðan gjørdi Fisichella sær ómak, við at lata Alonso koma skjótt framvið sær, men forðaði Räikkönen og Webber at sleppa skjótt framvið sær, tá teir tríggir fremstu fóru eitt umfar framvið honum. Hetta legði alt ein myrkan skugga yvir eina annars frálíka koyring.

Við sigrinum vaks Alonso um munin niður til Michael Schumacher í kappingini um heimsmeistaraheitið til 21 stig.



*Dramatikkurin var stórur, tá Kimi Raikkonen í skundi mátti sleppa sær brennandi McLaren bilinum*

*Mynd: Scanpix*

# Michael Schumacher kolldømdur

**Michael Schumacher fekk ein sera svartan blett á sítt umdømi, tá hann forðaði kappingarneytum sínum í at taka fyrstu byrjunarstøðu. Hóast Schumacher segði, at talan var um eitt óhapp, so trúði dómsnevndin honum ikk**

FORMIL 1

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Dómsnevndin í formil 1 koyringini í Monako kolldømdi leygardagin fyrstu byrjunarstøðuna hjá sjeyfalda heimsmeistaranum í formil 1 Michael Schumacher, og týskarin byrjaði tí aftastur í koyringini sunnudagin.

Tað var óhappið hjá Michael Schumacher í næst seinasta svingið í tíðarkoyringini, ið m.a. forðaði núverandi heimsmeistaranum Fernando Alonso í at seta skjótastu tíðina, ið dómsnevndin ikki metur var eitt óhapp, men heldur at Michael Schumacher steðgaði tilvitað. Hetta byggir á, at dómsnevndin ikki metti Schumacher hava nakra orsøk til at bremsa so hart, tí hann misti tamarhaldið, tí hann koyrdi ikki skjótari enn hann hevði gjørt umfarið áðrenn.

Liðstjórin í Ferrari Jean Todt var sera ónøgdur við avgerðina hjá dómsnevndini. Hann segði, at hetta skapar eitt sera óheppið fyridømi, ið í grundini tekur hugtakið koyrivillur burtur úr rasarakoyring.

Jean Todt segði við heimasíðuna hjá Ferrari, at hetta er burturvið, og at við at hyggja at tíðini, ið Michael Schumacher koyrdi hetta umfarið, so var greitt, at hann royndi at betra sína tíð uppaftur meira.

Eisini Giancarlo Fisichella varð revsaður fyri at hava forðað David Coulthard í at seta eina skjóta tíð. Fisichella hevur mist trý tey skjótastu umførini, og byrjar tí væntandi úr níggjundu støðu.

**Úrslit av formil 1 koyringini í Monako:**

| | |
|---|---|
| 1 | Fernando Alonso Renault 10 |
| 2 | Juan Pablo Montoya McLaren-Mercedes 8 |
| 3 | David Coulthard RBR-Ferrari 6 |
| 4 | Rubens Barrichello Honda 5 |
| 5 | Michael Schumacher Ferrari 4 |
| 6 | Giancarlo Fisichella Renault 3 |
| 7 | Nick Heidfeld Sauber-BMW 2 |
| 8 | Ralf Schumacher Toyota 1 |
| 9 | Felipe Massa Ferrari |
| 10 | Vitantonio Liuzzi STR-Cosworth |
| 11 | Jenson Button Honda |
| 12 | Christijan Albers MF1-Toyota |
| 13 | Scott Speed STR-Cosworth |
| 14 | Jacques Villeneuve Sauber-BMW |
| 15 | Tiago Monteiro MF1-Toyota |
| 16 | Frank Montagney Super Aguri-Honda |

**Komu ikki á mál:**

- Jarno Trulli Toyota
- Christian Klien RBR-Ferrari
- Nico Rosberg Williams-Cosworth
- Kimi Räikkönen McLaren-Mercedes
- Takuma Sato Super Aguri-Honda
- Mark Webber Williams-Cosworth

**Støðan koyrarar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | Spania | 64 |
| 2 | Michael Schumacher | Týskland | 43 |
| 3 | Kimi Räikkönen | Finnland | 27 |
| - | Giancarlo Fisichella | Italia | 27 |
| 5 | Juan Pablo Montoya | Kolumbia | 23 |
| 6 | Felipe Massa | Brasilia | 20 |
| 7 | Jenson Button | Ongland | 16 |
| 8 | Rubens Barrichello | Brasilia | 13 |
| 9 | Ralf Schumacher | Týskland | 8 |
| - | Nick Heidfeld | Týskland | 8 |
| 11 | David Coulthard | Skotland | 7 |
| 12 | Mark Webber | Avstralia | 6 |
| - | Jaques Villeneuve | Kanada | 6 |
| 13 | Nico Rosberg | Týskland | 4 |
| 14 | Christian Klien | Eysturríki | 1 |

**Støðan lið:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Renault | 91 |
| 2 | Ferrari | 63 |
| 3 | McLaren-Mercedes | 50 |
| 4 | Honda | 29 |
| 5 | Sauber BMW | 14 |
| 6 | Williams-Cosworth | 10 |
| 7 | Toyota | 8 |
| 8 | Red Bull Racing Ferrari | 8 |